# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
POST@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*- Tað er nógv sum bendir á, at tað neyvan fer at geva nakað, at pumpa pening blint inn í okkara sjúkrahúsverk. Vit hava ongar ábendingar um, at sovorðin peningur fer at hækka um støði og framleiðslu. Hinvegin er tað nógv sum bendir á, at vit hava tørv á strukturbroytingum í kanning og viðgerð.*
*JÁKUP PETERSEN, YVIRLÆKNI*

## Eitt ræðandi minni

Í dag er 11. september, og vit minnast øll ræðuligu hendingina í New York, tá terrroristar frá al-Qaeda gjørdu av við nærum 4000 fólk. Hetta skuldi gerast ein hending, sum veruliga broytti heimin. Hon fekk ávirkan á heimsbúskapin, á valdsjavnvágina, á oljuprísin og ikki minst á sjálvan gerandisdagin hjá okkum øllum. Eftir hesa hending gjørdurst orðini terror og trygd lyklaorðini í altjóða tjakinum.

Álopini á teir báðar risastóru bygningarnar í amerikanska stórbýnum og á sjálvt hjartað hjá amerikonsku hermegini, Pentagon, fáa serliga umrøðu um allan heimin júst í dag, nú tað eru gingin fimm ár, síðani henda í heimssøguni mest dramatiska og óhugnaliga terroratsókn varð framd.

Eldglæman frá flogførunum, ið sprongdust í luftina, tá tey raktu teir World Trade Center, hevur brent seg inn í nethinnuna hjá milliardum av menniskjum. Júst henda myndin man vera tann, sum í heimssøguni stendur klárast fyri flest menniskjum á jørð.

Og hvat kunnu vit so siga fimm ár eftir! Er hetta bara eitt minni, ið vit skulu taka fram henda dag ella er hetta nakað meira. Hendingarnar, sum komu í kjalarvørrinum á 11. september, hava verið eins álvarsligar og óhugnaligar sum sjálvar atsóknirnar henda eina dag. Men tíðin eftir 11. september hevur merkt okkum øll, hon ger tað framvegis og fer uttan iva at kennast langt inn í framtíðina.

11. september hevur gjørt altjóða terror til heimsfíggjinda nr. 1. Og í hesum sambandi hevur trygd fingið fremstu raðfesting. Lógir og reglur og fyriskipanir verða nú smíðaðar og gjørdar við 11. september sum útgangssstøði. Illgrunin um yvirgang er vorðin so djúpt gróðurfestur, at hann í nógvum førum er farin yvir gevind. Mong ósek merkja eisini sviðan av hesum. Annars hevur yvirgangur móti ósekum í Spania, Onglandi, Egyptalandi, Jordan oø. gjørt, at óttanin og eisini haturið, sum kom í kjalarvørrinum á 11. september, er at finna allastaðni.

Stríðið í Afganistan og kríggið í Irak, sum eisini vórðu avleiðing av 11. september, standa við. Tað var rætt at fara í hernað móti Taliban, tí hesir vóru partur av atsóknunum í New York og framdu andaliga neyðtøku av sínum egna fólki, kvinnunum. Hóast eingin av okkum tók undir við stýri Saddams, so var tó eingin haldgóð orsøk til at fara í kríggj. Sjálvandi mugu vit vera á varðhaldi, men vit mugu heldur ikki misbrúka 11. september til at rættvísgera egnar valdsgerðir. Atgerðir móti fátækradømi, órættvísi og brot á mannarættindi eins og diplomati og samráðing eiga at koma í hásæti.

**Sosialurin**

# Styttri innleggingartíðir eru ikki gjørdar fyri at spara

**JÁKUP PETERSEN**
yvirlækni



**- Eg haldi, at stundin er komin til at taka eitt sindur í egnan barm. Tað liggur á markinum til skomm, hvussu vit læknar reagera, tá onkur uttanífrá kemur við atfinningum, sigur Jákup Petersen, yvirlækni á Landssjúkrahúsinum, sum vísir aftur, at vantandi játtan er orsøk til misnøgdina við Landssjúkrahúsið**

Og landsstýrismaðurin í Almanna- og Heilsumálaráðnum Hans Pauli Strøm hevur púra rætt

Eg kenni onki sjúkrahús, sum ikki hevur trupulleikar. Eg kenni ikki til, at Landssjúkrahúsið hevur størri trupulleikar enn so mong onnur sjúkrahús. Men at kasta skuldina fyri trupulleikum á manglandi játtan til Landssjúkrahúsið er púra burturvið!

### Ongi tekin til manglandi játtan

Í 2002 hevði eg grein, har eg gjørdi eg eina sammeting av okkara sjúkrahúsverki mótvegis okkara grannalondum, og varð tað heilt greitt, at játtanin varð á leið við okkara grannalond.

Niðurstøða mín í dag er tann sama sum eg hevði í 2002. Nevniliga at:

»Tað er nógv sum bendir á, at tað neyvan fer at geva nakað, at pumpa pening blint inn í okkara sjúkrahúsverk. Vit hava ongar ábendingar um, at sovorðin peningur fer at hækka um støði og framleiðslu.

Hinvegin er tað nógv sum bendir á, at vit hava tørv á strukturbroytingum í kanning og viðgerð. At tann samlaða kanningar- og viðgerðarketan eigur at verða endurskoðað við atliti til at hækka forkanningarstøðið, stytta um innleggingartíð, gera meira ambulantar viðgerðir o. s. fr.. Til hetta krevst ikki meira peningur, men tað er alneyðugt, at tað verður gjørt av "fólkinum á gólvinum" so vit ikki enn einaferð fáa eina fyrisitingarliga glæstriborg, sum vit ikki kunnu brúka til nakað.«

### Fyrisitingarligar glæstriborgir

Men vit fingu eina fyrisitingarliga glæstriborg, sum hevur kravt nógvar stúttur fyri at standa uppi. Harafturat fingu vit hópin av peningi. Væl meira enn okkara grannalond. Uttan at nakað stórvegis sást aftur í støði og framleiðslu. Tíðin er helst komin til at leggja á annan bógv.

### Landsstýrismaðurin rakar seymin á høvdið

Tað varð tí hugvekjandi at lesa greinina hjá landsstýrismanni Hans Paula Strøm, har hann sera greitt við orðum og tølum jarðar pástandin um manglandi játtan. Eg haldi, at stundin er komin til at taka eitt sindur í egnan barm. Tað liggur nú á markinum til skomm, hvussu vit læknar reagera, tá onkur uttanífrá kemur við atfinningum. Hvørja ferð okkurt er á vási er loysnin, at játtanin skal økjast. Hetta lækkar um okkara trúvirði sum læknar. Og tað er ikki so langt síðani, at stórt sæð allir trupulleikar kundu loysast við nýggjum bygningi. Og hann hava vit jú fingið!

### Ambulant kirurgi

Ambulant kirurgi hevur verið nevnt sum eitt slag av neyðloysn, tí ov lítið av peningi er til. Hetta er sjálvandi ikki so. Tað gjørdist greitt fyri okkum læknum fyri nógvum árum síðani, at orsakað av nýggjari tøkni varð tað gjørligt at lyfta ávísa viðgerð á eitt hægri støði við at gera hana ambulanta.

Tað sum vunnið varð í hesum sambandi varð til dømis minni av skúkrahúsinfektionum. Styttri sjúkraskriving og skjótari afturgong til arbeiðið. Ella við øðrum orðum, sjúklingurin kom seg skjótari eftir skurðviðgerð. Minni stress hjá sjúklingi í samband við viðgerð, tí innleggjan ikki varð neyðug.

Starvsfólk fingu minni náttararbeiði og harvið betri møgurleika at fyrireika og útynna førleikamenning o. s. fr. Sparing varð ongantíð eitt primert endamál. Tað gjørdist eisini skjótt greitt, at sjúklingunum dámdu henda viðgerðarhátt nógv betri enn innleggjan. Okkara endamál varð ikki sparing, men hægri støði, minni komplikatiónir og betri nøgdsemi millum sjúklingar og starvsfólk. Í okkara grannalondum eru tey komin væl longri á hesum øki.

### Innleggjan og útskrivan

Havt hevur verið frammi, at læknar fyri at spara eru farnir, at útskriva sjúklingar fyrr enn vanligt og eru harafturat ein forðing fyri innleggjan. Hetta er sjálvandi heilt burturvið. Eg vísti longu í 2002 at vit høvdu longsta innlegingartíð í Norðurlondum.

Allar kanningar eg kenni til vísa, at tað er munandi betri fyri sjúklingina at stytta um innleggingartíðina. Minni infektiónstrupulleikar, skjótari rehabilitering og betri nøgdsemi. Men tað krevur at viðurskiftini eru vælskipaði. At informatiónin til sjúklingarnar er góð og planleggingin væl gjøgnumførd. Tá alt hetta riggar, so fara sjúklingar tíðliga og í góðum hýri av deildini.

Starvsfólk kenna eisini, at tey gera eitt meiningsfullt arbeiði og eru hugalig í sínum arbeiði. Styttri innleggingartíðir eru ikki frá læknaligari síðu gjørdar fyri at spara, men eru ein náttúrlig fylgja av menning innan viðgerðarháttir og tøkni. Og er samstundis við til at hækka viðgerðarstøðið og økja um nøgdsemi hjá sjúklingum. Eg haldi ikki, at tað skuldi verið neyðugt at gera viðmerkingar til pástandin um, at vit eru ein forðing fyri, at sjúklingar verða innlagdir, tá tørvur er á hesum.

Og at enda eitt hjartasuff. Í aftursvari Læknaráðsins til løgtingsmann Bill Justinussen stendur millum annað:

»Tað er neyvan so, at allir læknar á Landssjúkrahúsinum eru líkasalir og ódugnaligir kynikar við samstarvstrupuleikunum«.

Álvaratos, kæru kollegar! Eg gangi út frá, at hetta er ein misskiljing. Eg kenni ongan lækna á Landssjúkrahúsinum við omanfyrinevndu eginleikum.

**Sosialurin** **Sosialurin** Stovnaður: 1927

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.